# Um fimm ár eru vit komin á mál

**– Tað er ongin ivi um, at føroyski landskassin kann fáa milliónir burturúr at skráseta úrtlendsk skip í Føroyum, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður**

ALTERNATIV INNTØKA
*Áki Bertholdsen*



*Enn er føroyska altjóða skipaskrásetingin ikki nóg lokkandi hjá útlendskum reiðarum, men tað verður hon og endamálið er, at vit skulu verða til reiðar um fimm ár, sigur Jørgen Niclasen, sum her er avmyndaður á ráðstevnu hjá Skipatingi týsdagin. Tað er landsstýrismaðurin longst til høgru. Hini eru, frá høgru, Óla Hans Hammer Olsen, stjóri á Skipaeftirlitinum,Gunnbjørn Joensen, reiðari í Hósvík, Per Gulklett, skipsmeklari í Keypmannahavn, Petra Johnsdottir Joensen á Almannastovuni, Regin Thomsen á Toll-& Skatt og Torleivur Mikkelsen, umboð fyri útlendsk reiðarí í Føroyum*

Um fimm ár skulu vit hava eina munandi inntøku burturúr at skráseta útlendsk skip í Føroyum.

Tað er málið, ið Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, hevur sett sær.

Tí er hann nú farin undir arbeiðið at laga føroysku, altjóða skipaskrásetingina, FAS, til, so at hon verður meiri lokkandi hjá útlendskum reiðarum.

Týsdagin helt felagið Skipating ráðstevnu um, hvussu FAS kann gerast eitt fíggjarligt ískoyti hjá føroyska samfelagnum.

Niðurstøðan á fundinum var, at tað avgjørt ber til at fáa munandi størri inntøku burturúr at fáa útlendsk skip at skráseta seg í Føroyum.

Jørgen Niclasen sigur, at tað eru oyggjalond, sum forvinna upp ímóti einari heilari milliard burturúr at skráseta útlendsk skip, men tey hava eisini ómetaliga nógv skip.

Han vísir á, at Isle of Man hevur 800 útlendsk skip í sínari altjóða skrásetting og feløgini, sum eiga hesi skipini, hava 500 fólk í starvi á Isle of Man.

Hóast vit tosa um minni mátistokk í Føroyum, siga tølini eitt sindur um, hvørjir møguleikar eru hjá tí, sum leggur seg eftir teimum.

Ikki minst kastar ein slík skráseting nógv avleitt virksemi av sær, eitt nú til sakførarar, grannskoðarar, skrivstovufólk og onnur, eins og talan er um á Isle of Man.

– Tað sigur okkum so mikið sum tað, at FAS skipanin kann gerast ein munandi ískoyti hjá føroyska landskassanum, sigur Jørgen Niclasen.

### Farin til verka

Men hann leggur afturat, at tíverri eru føroyingar nakað seinir á sjóvarfallinum.

Onnur land hava havt altjóða skipaskrásetingar nógv longri enn vit og eru tískil tað frammanfyri okkum.

Men hóast tað er ætlanin at fáa FAS skipanin at virka betri, tí Landsstýrismaðurin er enn sannførdur um, at tað ber til at fáa hetta at kasta nakað av sær.

Hann vísur á at FAS skipanin kom í 1992. Tá var endamálið við henni at forða fyri, at tey føroysku farmaskipini ikki fóru undir útlendskt flagg, tí bæði danir og norðmenn høvdu fingið sínar skipanir.

–Tað eydnaðist, men nú er stundin komin at fara víðari.

Og hann er longu farin til verka at fáa FAS skipanina at virka betri.

Hann hevur sett eitt FAS-Forum, sum longu hevur havt sín fyrsta fund.

Í hesum forum eru umboð fyri Felagið fyri Farmaskip, Almanna- og Heilsumálassstýrið, Fíggjarmálastýrið, Vinnumálastýrið og Fiskimálastýrið, umframt eitt umboð uttanífrá.

– Endamálið hjá hesum forum er at savna alla vitan, sum hevur við FAS at gera á einum og sama stað.

Somuleiðis skal tað laga FAS- skipanina til, so at hon verður meiri lokkandi hjá útlendskum reiðaríðum, og harumframt skal hon verða einfaldari at umsita.

Hann sigur, at FAS skipanin er nevniliga bæði ein skipan, sum fevnir um skattamál, sosial gjøld og annað, tí eru tey flestu stýrini umboðað.

– Vit ætla at byggja okkara FAS skipan á dygds og á tænastu.

– Tað merkir at tá ið útlendskir reiðarar venda sær til Føroyskar myndugleikar við fyrispurningum um FAS, skal tað bera til at fáa allar spurningar svaraðar á sama stað og tað verður uppgávan hjá okkara FAS-forum at bera so í bandi, at alt er savnað á einum stað. Og stinga trupulleikar seg upp, skal tað bera til hjá einum reiðara at fáa allar trupulleikar loystar á einum stað.

Hann sigur, at ein týðandi táttur í arbeiðnum at laga skipanina til, verður at gera hana einfaldari at umsita.

– Tað elvir til misnøgd, tá ið reiðarar fáa eykarokningar fyri gjøld í Føroyum, sum teir ikki vistu um áðrenn, eitt nú gjøld til sosialar skipanir og tað mugu vit sleppa undan.

Hann sigur, at tá ið tað er fingið frá hondini, skal greiða finnast á, hvørjum skipum, vit skulu leggja dent á at fáa til Føroyar.

– Har haldi eg at tað mest sannlíka er,at vit fara at royna at fáa skip úr Evropa, sum eru í góðum standi, til Føroya, heldur enn skip undir ymsum hentleikafløggum, sum eru í ringum standi, hóast tey eru fleiri í tali.

# Skal vera so einfalt sum gjørligt

**– Vit skulu ikki hava rustikustar til Føroya, men heldur skip á einum ávísum støði, sigur Andras Joensen, formaður í Skipatingi**

ALTERNATIV INNTØKA
*Áki Bertholdsen*

– Vit skulu hava eina so einfalda skipan sum gjørligt.

Tað heldur Andras Joensen, formaður í felagnum Skipatingi, er lykilin til at fáa tað føroysku, altjóða Skipaskrásetingina, FAS, at virka betri.

Eftir ráðstevnuna umFAS skipanina er hann sannførdur um, at tað ber til at fáa meiri burturúr skipanini, bæði tí møguleikarnir eru har og tí at politiskur vilji er til at gera nakað við málið. er hann sannførdur um, at tað ber til at fáa meiri burturúr skipanini, bæði tí møguleikarnir eru har og tí at politiskur vilji er til at gera nakað við málið.

– Trupulleikin er, at FAS hevur ongan góðan átt. Tá ið reiðarar hava vent sær til FAS, hava teir fingið svar nakrar mánaðir seinni og tað gongur ikki.

– Men tað er batnað í seinastuni og nú hevur politiski myndugleikin sett sær sum mál at um fimm ár skulu vit hava fingið meiri burturúr, sigur Andras Joensen. Sí greinina omanfyri.

Men hann sigur, at skulu vit røkka so langt, er tað neyðugt at fáa nøkur viðurskifti í rættlag.

– Eitt er, at vit mugu gera okkum greitt, hvørji útlendsk skip, vit vilja hava til Føroyar.

Har heldur hann, at tey flestu hella til, at talan skal vera um skip í góðum standi og at ongin hevði serliga áhuga fyri at fáa ”gamlar rustikustar” í skipanina.

Men harumframt er tað eisini neyðugt at laga sjálva skipanina til.

– Endamálið má vera at skipanin skal verða so einføld sum gjørligt at umsita, bæði hjá føroyingum og hjá reiðarum.



*Ráðstevnan hjá Skipatingi hevði ávísan áhuga, Her eru tað f.v. Jógvan Sundstein, grannskoðari, Árni Joensen, stjóri á Skipafelagnum og Poul Mohr, stjóri á skipasmiðjuni*

– Tað ringasta sum hendir, er, at reiðarar, sum koma til Føroyar við sínum skipum, fáa óvæntaðar eykarokningar av og á, sum ongin visti um frammanundan, eitt nú til ALS og barnsburðargrunn o.s.fr.

– Vit mugu eisini umhugsa, hvussu vit gera skipanina, um vit framvegis skulu krevja skatt frá manningunum á teimum útlendsku skipunum, ella um vit t.d. skulu leggja eitt gjald á eftir, hvussu stór skipini eru, sama hvaðani manningin er, og spurningurin er eisini um tað skal vera eitt krav, at ávísir av manningini skulu vera føroyingar, ella ikki, sigur Andras Joensen.

Hann sigur nevniliga, at ein stórur partur av inntøkunum frá altjóða skipaskrásetingum stava frá teimum avleiddu vinnum, ið hetta kastar av sær, eitt nú grannskoðarar, sakførarar og innanfyri skipavinnuna sum heild.



# Háskúlanæmingar rannsókn á Sosialinum




*Nakrir háskúlanæmingar vitjaðu seinnapartin týsdagin á Sosialinum í sambandi við lærugrein, sum eitur rannsókn*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Seinnapartin týsdagin var ein flokkur av Háskúlanum og vitjaði á Sosialinum. Hetta var í sambandi við eina lærugrein, sum eitur Rannsókn. Lærugreinin umfatar mestsum alt, ið næmingarnir hava hug til**

VITJAN
*Ingrid Bjarnastein*

Umleið 15 háskúlanæmingar komu seinnapartin týsdagin á gátt í gula blaðhúsinum úti á Argjum. Teir vildu fegnir vita, hvussu eitt blað varð framleitt.

– Hetta er í sambandi við lærugreinina rannsókn, greiðir lærarin, Elin Lindenskov frá. – Rannsókn er ein lærugrein, sum er hvønn týsdag í tveir tímar, har næmingarnir fara út á eitt hvørt virki, fáa vitjan av onkrum, vitja listaframsýningar og annað. Teir hava longu verið í Útvarpinum, og nú legði onkur ynski fram um at sleppa at síggja, hvussu eitt blað varð framleitt.

Næmingarnir fingu eitt sindur at vita um søguna hjá blaðnum, og hvussu ein arbeiðsdagur vanliga er. Teimum varð fortalt um tey ymsu virksemini blaðið hevur, og hvussu blaðið verður sett upp.

Tá Jan Müller var liðugur at greiða næmingunum frá blaðnum sjálvum, varð gjørdur ein túrur runt í húsinum, har næmingarnir sluppu at síggja, næstan trin fyri trin, hvussu blaðið spakuliga tekur skap, hvønn dag.

Spurdir um hetta var soleiðis teir høvdu ímyndað sær, at eitt blaðhús var, søgdu teir:

– Nei, vit høvdu væntað, at her var alt kaos, siga teir flennandi. – Tað er tað altíð í filmum. Fólk, sum renna veipandi við onkrum og rópa.

Men hóast hetta, so var ímynd teirra ikki nógv broytt eftir vitjanina, siga teir.


## Starvsfólk til Avrokningardeildina

"Tað hevði verið nógv lættari hjá fólki at fikið avgerð, um tey vistu; hvørja avgerð tey skuldu tikið"
Aldous Huxley



Til okkara avrokningardeild verður søkt eftir fólki at byrja 1. mars 2002 ella skjótast gjørligt. Á avrokningardeildini starvast 9 fólk. Høvuðsuppgávurnar á avrokningardeildini eru debitorbókhald, debitorrøkt og innheintingarmál.

Uppgávan hjá tí, sum sett/ur verður, er serliga at vera við í menningini av debitorrøktini hjá Føroya Tele og annars at vera við í øðrum uppgávum á avrokningardeildini. Talan er um krevjandi og avbjóðandi starv.

**Tín førleiki**
Tann, ið sett/ur verður, skal hava skrivstovu-, peningastovns- ella hægri búskaparfrøðiliga útbúgving. Dentur verður lagdur á, at viðkomandi hevur royndir frá arbeiði við debitorum og leggur stóran dent á, at geva viðskiftafólki okkara eina góða tænastu. Somuleiðis skal viðkomandi kunna taka ábyrgd, arbeiða sjálvstøðugt og vera opin.

**Tað er eisini ein fyrimunur at hava**
· EDV førleika (á brúkarastøði)
· merkonom, HH, HA ella aðra viðkomandi útbúgving
· góðan røkjuskap
· góð samstarvsevni

Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum góðum, avbjóðandi og mennandi umhvørvi.

Lønin verður sambært avtalu millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið ella annað viðkomandi yrkisfelag.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at ringja til Jákup Danielsen, deildarleiðara, lokal 3370 ella Heina Joensen, fíggjarstjóra, lokal 3297.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. februar 2002.

Umsóknir skulu sendast til

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

**Føroya Tele er partafelag, ið Føroya Landsstýrið eigur 100%. Á Føroya Tele arbeiða 250 fólk í 30 deildum á 14 ymiskum støðum kringa alt landið. Fjarskiftisøkið er í stórari menning og tí er neyðugt at starvsfólk á Føroya Tele skulu kunna tola broytingar í starvsviðurskiftunum.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*